# Tvey nýggj í nevndini hjá MBF

**Leila Solmunde og Lea Wolles eru nývaldar í nevndini hjá MBF, sum hevði aðalfund leygardagin**

NEVNDARVAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Á aðalfundinum hjá Meginfelag teirra brekaðu leygardagin var nevndarval á skránni. Marjun Sigurðsdóttir tók ikki við afturvali til formanssessin, og í hennara stað er Leila Solmunde vald.

Nærum øll starvsnevndin varð afturvald á aðalfundinum. Randfríð Sørensen, Hildibjørg Weihe og Annika Højgaard vórðu allar afturvaldar, meðan Lea Wolles er nýggj í nevndini.

Starvnevndin hevur ikki skipað seg enn, men av MBF verður sagt, at hon skipar seg í næstum.



*Starvsnevndin í MBF: Fráfarandi og sitandi limir*
*Mynd: Jan Müller*

# Føroyskt smør á marknaðin

**Stjórin á MBM, Eirikur Thorvaldsson, væntar, at góðskan á føroysku smørframleiðsuni verður betri enn tann útlendska**

FØROYSKT SMØR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Um góðan mánað fáa føroyingar møguleikan at ogna sær føroyskt smør í kølidiskunum kring landið. Tað er Meginfelag Búnaðarmanna, sum er farið undir at framleiða føroyskt smør.

Stjórin á MBM, Eirikur Thorvaldsson, sigur, at MBM hevur gamla útgerð til smørframleiðslu, sum teir hava valt at taka í nýtslu.

– Fólk eta og drekka alsamt soltnari, og hetta hevur við sær, at nógvur fitið leypur av. Heldur enn at koyra avlopið burtur, hava vit valt at gera smør burtur úr avlopinum, sum vit ætla at selja, sigur Eirikur Thorvaldsson.

Umframt gomlu smørmaskinuna, hevur MBM eisini keypt sær eina pakkimaskinu til nýggju smørframleiðsluna hjá virkinum.



*Um góðan mánað verður møguleiki at ogna sær føroyskt smør í kølidiskinum kring landið*
*mynd: Jens Kristian Vang*

## Betri góðska

Stjórin á MBM ásannar, at MBM hevur ikki møguleikan at nøkta allan smørtørvin í Føroyum, men hann er sannførdur um, at føroyska framleiðslan fer at hava betri góðsku enn tann útlendska.

– Smørið hjá okkum verður gjørt upp á gamla máta. Útlendska smørið er gjørt við automatiskum maskinum, meðan okkara smør líkist heimagjørdum smøri, greiðir Eirikur Thorvaldsson frá

Spurdur um prísin á nýggju føroysku smørframleiðsluni, svarar stjórin á MBM, at prísurin verður á sama støðið sum tað útlendska smørið.

## Vanta innbjálving

MBM hevur gjørt fleiri royndarframleiðslur av nýggja smørinum. Eirikur Thorvaldsson sigur, at í løtuni verður bíðað eftir sjálvari innbjálvingini við merkinum MBM á, áðrenn smørið verður at fáa í handlinum kring landið.

Stjórin í MBM sigur seg vænta, at einar 3-4 vikur ganga, áðrenn møguleiki verður at ogna sær føroyska smørið.

Á MBM hava fleiri uppskot verið um heitið á nýggja smørinum, og eftir øllum at døma verður heitið heilt einfalt: Føroyskt smør.

# Hans Pauli kannar møguleikarnar

**Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, sigur, at Almanna- og Heilsumálaráðið í løtuni kannar møguleikan fyri at geva lítla Peturi eitt serligt stovnstilboð í Føroyum, so 5 ára gamli drongurin ikki verður noyddur av landinum á danskan viðgerðarstovn**

LÍTLI PETUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í gjár sendu limafeløgini í MBF eina yvirlýsing til fjølmiðlarnar, har tey staðiliga mótmæltu ætlanini at senda fimm ára gamla Petur, sum hevur atferðartrupulleikar, av landinum.

Bára Johansen er formaður í MBD/DAMP felagnum, og í Sosialinum í gjár greiddi hon frá, at yvirlýsingin er seinasti møguleiki at fáa landsstýrismanninum at broyta avgerðina um at senda fimm ára gamla Petur av landinum á danskan viðgerðarstovn. Um Hans Pauli Strøm hevur tikið yvirlýsingina til eftirtektar ella ei skal verða ósagt, men í løtuni kanna fólk á Almanna- og Heilsumálaráðnum av øllum alvi møguleikan fyri at veita lítla Peturi eitt stovnstilboð í Føroyum.

– Eg vil fyri alt í verðini ikki koma fram til eftir, at málið endaliga er viðgjørt, at har vóru møguleikar; vit ikki kannaðu. Vit royna, eins og vit hava gjørt gjøgnum alt málið, at kanna hvørjir møguleikar og loysnir eru í spurninginum, greiðir Hans Pauli Strøm frá.

Spurdur, um nær embætisfólkini á almanna- og heilsumálaráðnum koma til eina endaliga niðurstøðu í málinum, svarar landsstýrismaðurin, at tað er torført at meta um, tí tað eru nógv fólk, sum skulu spyrjast í málinum.




*Embætisfólk á Almanna- og Heilsumálaráðið arbeiða í løtuni við at kanna møguleikan fyri at geva lítla Peturi eitt serligt stovnstilboð í Føroyum.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Onnur raðfesting

Hans Pauli Strøm greiðir frá, at málið um fimm ára gamla Petur er einstakt, og sum støðan er í løtuni er eingin stovnur, sum kann nøkta hansara tørv.

– Tað eru stovnstilboð til atferðartrupul børn í aldrinum 10-12 ár, men ikki fyri smábørn sum Petur. Vit eru eitt lítið land, og tað er tí ógvuliga trupult at raka allan tørvin hjá atferðartruplum børnum, sigur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum.

Hann leggur afturat, at higartil hevur politiski myndugleikin raðfest fosturfamiljuskipanina til smábørn við atferðartrupulleikum fremst, heldur enn at bjóða børnum serlig stovnstilboð.



# Eitt upplivilsi fyri lívið

**Hetta var eitt upplivilsi fyri lívið sigur Edmund Joensen, løgtingsformaður, sum er errin av at vera við í einum kongsríki og einum fólkaræði, sum skarar framúr**

KONGLIGT BRÚDLEYP
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta var eitt upplivilsi fyri lívið.

Edmund Joensen, løgtingsformaður, er ikki ósamdur við løgmann, tá ið hann heldur, at tað var sum eitt ævintýr at vera í kongligum brúdleypi í farnu viku.

– Í ævintýrunum plaga brúdleypini at vara eina viku og tað gjørdi hetta eisini.

Edmund Joensen og konan vóru boðin í brúdleyp hjá krúnprinsaparinum saman við løgmanni og konu hansara.

Hetta er ikki fyrstu ferð, Edmund Joensen er í kongligum selskapi, tí hann var eisini í brúdleypi hjá Joakim, prinsi og hann var somuleiðis í trúðlovilsisgildi hjá krúnprinsaparinum.

Men at vera í brúdleypi hjá einum krúnprinsapari, er nakað heilt serligt, sigur Edmund Joensen.

Og hann sigur, at hann er stoltur av av at vera í einum kongsríki, sum skarar framúr í heiminum og sum hevur ment seg lið um lið við einum fólkaræði og einum vælferðar samfelag, sum skarar framúr.

– Danska kongshúsið hevur megnað ómetaliga væl at ment seg undir liðini á fólkaræðinum og vælferðarstatinum, uttan at tað hevur kostað kríggj og blóðugar kollveltingar sum so manga aðrastaðni.

Løgtingsformaðurin sigur, at føroyingar hava besta boð uppá at hava elsta ting í Evropa og somuleiðis er danska kongshúsið tað elsta á okkara leiðum.

Samstundis hevur allur heimurin tað danska kongshúsið, tað danska fólkaræði og tann danska vælferðarstatin sum eina av teimum heilt stóru fyrimyndunum.

– Í so máta er tað ein serlig kensla at vera ein partur av hesum, sigur Edmund Joensen

## Sum á Ólavsøku

Edmund Joensen er sannførdur um, at danska kongshúsið hevur djúpar røtur í vanliga fólkinum.

– Í brúdleypsvikuni var lagið í Keypmannahavn sum tað plagar at vera á Ólavsøku í Føroyum. Tað var eitt hátíðarhald, sum hvørt mansbarn tók lut í og sum vísur, hvussu djúpar kenslur vanligi danin hevur fyri kongshúsinum.

– Hetta var ein dagur, sum hevði ein serligan týdning fyri øll fólk. Men tað kemur ikki av ongum. Tað kemur av tí, at danska kongshúsið hevur megnað so væl at ment sg lið um lið við politisku skipanina.

Edmund Joensen er eisini sannførdur um, at hetta var eitt hátíðarhald, sum eisini hevði alstóran týdning fyri vanliga føroyingin.

– Eg havi hoyrt um nógvar føroyingar, sum skipaðu fyri ymsum tiltøkum hendan dagin, brúdleypi var og onkur hevur eisini flaggað.

– Føroyingar í Føroyum hava kanska verið meiri upptiknir av brúdleypinum, enn vit geva okkum far um.

– Í hvussu so er, hava føroyingar í Danmark tikið fullan lut hátíðarhaldinum, tí eg frætti um fólk, sum høvdu givið seg til støðu við vegin longu klokkan sjey á morgni fyri at kunna standa á einum góðum plássi, tá ið hestavognurin við teimum nýgiftu skuldi koyra framvið seint seinnapartin.

Edmund Joensen sigur, at sostatt heldur hann eisini, at kongshúsið stingur so djúpt í barmi á vanliga fólkinum, at hann ivast ikki í, at tað hevur eina langa framtíð.

Hann heldur eisini, at danir hava dugað sera væl at brúkt kongshúsið til at marknaðarføra kongshúsið. Tað er eitt lítið land, men tað fyllir nógv í hugaheiminum hjáfólki kring allan heim og tað er í stóran mun kongshúsinum fyri at takka.

Hann heldur, at hendan marknaðarføringin kemur øllum ríkinum til góðar. Limir í kongshúsinum vitja eisini Føroyar regluliga.



*Longu klokkan sjey um morgunin gávu fólk seg til støðu við vegin fyri at síggja tey kongligu. Danska kongshúsið er ein fyrimynd um allan heimin, sigur Edmund Joensen. Her er hann í finasta galla saman við Jóannesi Eidesgaard í kongligum brúdleypi*

## Løtt at práta við

Edmund Joensen sigur, at hetta eru stór tiltøk, sum tað býðst ikki nógv høvi til at fáa orð á tey kongligu.

Men í trúðlovilsisgildinum í heyst vóru ikki so nógv fólk og tað prátaði hann við øll í kongshúsinum, eisini við drotningina, prinsin, Fríðrik, Joakim, Mary, Alexander og hinar prinsessurnar.

– Eisini ta ferðina bar eg upp á mál at vit vildu hava tey til Føroya og eg skilti á teimum, at tað verður so skjótt, høvið býðst.

Edmund Joensen sigur, at tey kongligu eru sera fryntlig of fyrikomandi fólk at práta við.

– Eg prátaði eina góða løtu við Mary Donaldson bæði um Tasmania og um Føroyar. Eg greiddi henni frá í stórum um okkara politisku skipan, um hvussu føroyingar livdu og eg fortaldi henni eisini eitt sindur um okkara brúdleypssiðir og um okkara brúðarvísur.

Men á slíkari ferð býðst ikki eisini høvi til meiri álvarsligt prát.

– Vit hittu sjálvsagt eina rúgvu av politikarum og treyðugt so, verður nógv prátað og hetta er eisini eitt frálíkt høvi til at trýsta á ymsar knøttar, so politiskt koma vit heldur ikki heilt eiðasørir heimaftur, sigur Edmund Joensen.

# Stórfingnir dagar í Keypmannahavn

**– Krúnprinsabrúdleypið er tað stórfingnasta eg havi verið við til, tí alt var so flott og stílfult. Men tað var eisini ógvuliga strævið, sigur Edfríð Joensen**

KONGLIGT BRÚDLEYP
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta var eitt stórt upplivilsi. Tað var sum í ævintýrunum.

Edfríð Joensen á Oyri hevur júst upplivað nakrar hugtakandi dagar í kongsins Keypmannahavn.

Saman við manninum, Edmundi Joensen, løgtingsformanni, var hon boðin í brúdleyp hjá nýggju krúnarvingunum.

Og tað var eitt brúdleyp, sum vardi tað mesta av eini viku.

– Hetta var eitt brúdleyp, sum var so stórt og stórfingið sum í einum ævintýri, sigur hon.

Hetta er annars ikki fyrstu ferð, at Edfríð er í kongligari hátíðarveitslu.

Hon hevur áður verið í brúdleypi hjá Joakim, prinsi og Alexandru, prinsessu og hon var eisini í trúðlovilsisgildi hjá Fríðrikki og Mary.

– Men at vera í brúdleypi hjá krúnarvingunum, var eitt serligt upplivilsi, leggur hon afturat.

– Tað var heilt ótrúligt, sum alt var vakurt pyntað við blomstrum. Og pyntið var eisini so ótrúliga gjøgnumført við einum reyðum liti sum gekk ígjøgnum allastaðni.

Tað vóru kanska mong, sum ivaðust í, hvussu tað fór at eydnast at eta brúdleypsdøgverða í einum tjaldi.

Men Edfríð sigur, at har var óneyðugt at koma afturum aftur.

Tjaldið var hvítt og hóast tað vóru yvir 400 fólk til døgverða, var ivaleyst mikið av plássi. Á øðrumhvørjum borði vóru blómuprýðini høg og á øðrumhvørjum borði vóru tey lág og annars var alt tjaldið prýtt við blómum. Og undir loftinum hingu ljósakrúnur.

– Tað var so vakurt og hátíðarligt, tað skuldi upplivast, tí tað ber illa til at greiða frá tí, sigur Edfríð Joensen.

Men tað var annars ikki sum eitt føroyskt brúdleyp, tí her vóru bara tríggjar talur og sangur var so ongin.



*Edfríð Joensen og Anita Eidesgaard í fínasta stási í kongligum brúdleypi í farnu viku. – Onkur kundi kanska stúrt fyri, at koma at følt seg eitt sindur einsamallan í slíkum selskapi, men tað er tað als ongin orsøk til, tí øll eru ógvuliga blíð og prátingarsom, sigur Edfríð Joensen*

## Sera strævið

Men Edfríð Joensen viðgongur eisini, at tað var ómetaliga strævið til tíðir.

– Tað var ofta leingi at bíða og onkustaðni skuldu vit bíða standandi.

Hon nevnir at til døgverðan stóðu tey í tjaldinum og bíðaðu í yvir tveir tveir tímar, tí ongin mátti seta seg, fyrrenn tey kongligu vóru komin og tey vórðu seinkað.

Har vóru øll so ómetaliga fín og nógv vóru í ógvuliga fínum, síðum kjólum so í veruleikanum var eisini neyðugt at ansa væl eftir fyri ikki at traðka í kjólan hjá onkrari fínari dámu, sigur Edfríð flennandi.

Hon sigur, at trygdartiltøkini gjørdu, at tað bar ikki til at fara heim ímillum at skifta, so teimum klæðunum, tú vart í, teimum mátti tú vera í.

– Gøturnar rundanum vóru rætt og slætt avbyrgdar, so har kundi ongin ferðsla vera og tað bar heldur ikki til at ferðast, um okkum lysti. Vit koyrdu allastaðni í bussi fyri at trygdarvørðarnir kundu hava tamarhald á, hvørji fólkini vóru.

Hon sigur, at tað var ógvuliga møðsamt, men alt var so stílfult, at tað kundi ikki vera talan um at seta seg niður við borðið at bíða eftir teimum kongligu.

## Heilsaði upp á øll

Annars heldur Edfríð eisini, at tað var eitt stórt upplivilsi at sleppa at heilsa uppá øll tey kongligu.

– Tey stóðu øll lið um lið og tóku ímóti okkum, bæði drotningin, Heindrikkur, prinsur, brúðarparið, foreldur hennara og prinsessurnar Anna Maria og Benedikta og menn teirra, Konstantin kongur og Richard, prinsur.

Edfríð Joensen sigur, at av tí, at hetta ikki er fyrsta tiltakið av hesum slagi, hon er við til, er hon komin at kenna fleiri av fólkunum, serliga tey í fólkatinginum. Hon prátaði m.a. við Mejdal og konuna, Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharran og konuna, og Svend og Margrethe Auken eru altíð fryntlig og prátingarsom at hitta.

– Fólk eru í veruleikanum heilt ótrúliga fitt og fryntlig og løtt at práta við. Onkur kundi kanska stúrt fyri, at koma at følt seg eitt sindur einsamallan í slíkum selskapi, men tað er tað als ongin orsøk til, tí øll eru ógvuliga blíð og prátingarsom.

Og so upplivdi Edfríð eisini, at tey føroysku klæðini eru eitt gott amboð til at fáa samband við fólk uppá.

– Í kongliga leikhúsinum stóð eg og eygleiddi konu kanadiska sendiharran, tí hon var serstakliga fín.

– Brádliga stevnir hon beint yvir ímóti mær og fer at tosa við meg um, hvussu flott hon helt, at tey føroysku klæðini vóru. Hon rópti eisini mannin yvir at tosa og so prátaðu vit eina løtu um leyst og fast.

– Tað er kanska skjótt at fáa nervar fyri, hvussu tað nú fer at gangast ímillum hesi fínu fólkini, ella fyri at koma til at gera okkurt býtt.

– Men tað er heilt óneyðugt, tí hóast tey hoyra til ein úrvaldan skara, eru tey í veruleikanum tey ikki annað enn vanlig fólk og tey er skjótt, at tey fáa ein at føla seg væl tilpassar, sigur Edfríð Joensen.